Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 20. desember 2018**
Journalnr.: 18/00346-1

# Jólabræv 2018

Við hesum vil Tryggingareftirlitið nýta høvi at gera vart við og kunna um ávís viðurskifti, ið leiðslur í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar eiga at vera varug við í 2019.

## 1. Nýggjar kunngerðir

Sum kunnugt, koma í alt 5 nýggjar kunngerðir í gildi 1. januar 2019. Talan er um hesar kunngerðir:

1. Kunngerð um leiðslu og stýring av tryggingarfeløgum o.ø.
2. Kunngerð um solvens og rakstraræetlanir hjá tryggingarfeløgum
3. Kunngerð um at gera upp grundarfæfeingi (basiskapital) fyri tryggingarfeløg og tryggingarhaldfelagsskapir
4. Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum
5. Kunngerð um fráboðan av tøkniliga grundarlagnum o.a. fyri lívstryggingarvirksemi

Av broytingum í mun til regluliga fráboðanirnar við Tryggingareftirlitið kann nevnast, at:

- nevndir fyri tryggingarfeløgum, eftirlønargrunnum tryggingarhaldfelagsskapum nú skulu árliga senda meting av egnum váða og solvensi (ORSA) til Tryggingareftirlitið. Hetta skal gerast árliga, og í seinasta lagi tvær vikur eftir at nevndin hevur gjørt metingina,
- lívstryggingarfeløg skulu í seinasta lagi 30. juni senda eitt samanskrivað tøkniligt grundarlag til Tryggingareftirlitið,
- tryggingarhaldfelagskapir skulu lata inn kvartalsligar solvensfráboðanir (TP) til eftirlitið.
- Freistin at lata Tryggingareftirlitinum hálvársfrásøgn er longd, so freistin at lata inn nú er í seinasta lagi 30. september.

Sí annars yvirlit yvir *tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum* aftast í hesum brævi.

## 2. Víðkan av kunningarvirksemi

Tryggingareftirlitið hevur sum kunnugt í 2018 almannakunngjørt kanning av íløguavkasti hjá Lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum. Tryggingareftirlitið ætlar í 2019 at leggja søgulig roknskapartøl á heimasíðuna, eins og ætlanin er at almannakunngera eina frágreiðing um marknaðargongdina fyri tryggingarfeløgini í Føroyum, við samanberingar- og lyklatølum fyri undanfarin ári.

**3. Størri gjøgnumskygni og samanberleika fyri einstaka tryggingartakaran**

Í Danmark fylgja lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar sjálvboðið sonevndu *omkostningshenstilling* frá felagskapinum fyri tryggingarvinnu, *Forsikring & Pension*, í sambandi við:

- Vísan og útrokning av árliga kostnaðinum í krónum (ÅOK- årlige omkostninger i kroner) og í prosentum (ÅOP - årlige omkostninger i procent)
- Gerð og grannskoðan av háttalýsing (metodebeskrivelse) og avstemningsskema
- kostnaðarmátarar
- Eftirlønaryvirlitið (Pensionsoverblikket)

Endamálið við hesum er at gera tað sjónligt fyri einstaka kundanum, hvørjir kostnaðir kundin rindar fyri í sambandi við sína eftirlønarskipan.

Í Danmark hava lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar - somuleiðis sjálvboðið – umvegis Forsikring og Pension ment eitt tól, (*Fakta om Pension*) til eftirlønarkundar, ið ynskja at samanbera eftirlønarskipanir í ymsum feløgum. Data til skipanina verða latin av tryggingarfeløgunum sjálvum.

Tryggingareftirlitið er av tí fatan, at tey føroysku lívstryggingarfeløgini og eftirlønargrunnarnir eiga somuleiðis at miðja eftir at geva einstaka eftirlønarkunda sínum kunning um kostnaðir og avkast, sum er á sama støði sum donsk feløg geva sínum eftirlønarkundum.

Tryggingareftirlitið skal tí biðja nevndirnar fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar um at lata Tryggingareftirlitinum eina frágreiðing, sum lýsir hugburð felagsins til fremjan av líknandi átøkum í Føroyum. Somuleiðis verður nevndirnar bidnar um at lýsa, hvørji tiltøk skulu til, fyri at felagið kann geva teirra kundum áleið samsvarandi kunning, sum donsk feløg geva sínum kundum. Frágreiðingin skal vera latin Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi 1. juli 2019.

Tryggingareftirlitið fer síðani, saman við feløgunum, at arbeiða fram móti eini loysn, ið kann fremja betri gjøgnumskygni og samanberleika fyri føroysku eftirlønarkundarnar, so hesir fáa viðkomandi og einsháttaðar upplýsingar, ið betri kunnu brúkast til samanbering av avkasti og kostnaði hjá einstøku feløgunum.

**4. Kunningarfundur um nýggju ársroknskaparreglurnar**

Í sambandi við at nýggja kunngerðin um ársfrásagnir er komin í gildi, ætlar Tryggingareftirlitið at skipa fyri einum heildags kunningarfundi um nýggju roknskaparreglurnar. Kunningarfundurin verður ætlandi í mai.

**5. Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2019**

Í viðfesta fylgiskjali eru settar upp tíðarfreistir fyri, nær tilfarið skal verða latið Tryggingareftirlitinum.

----------------------------

Tryggingareftirlitið takkar fyri gott samstarv í brátt farna ári og ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Vinarliga

Jógvan Thomsen
Stjóri

/Terji Petersen

# Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2019

| **Tíðarfreistir:** | **Tilfar at lata Tryggingareftirlitinum:** | **Lógargrundarlag:** |
|---|---|---|
| 16. januar 2019 | Upplýsing um, nær **nevndarfundur** verður hildin, har **ársfrásøgnin** fyri 2017 verður **góðkend** | Sbr. §§ 122, stk. 1 í Tryggingarlógini |
| 1. februar 2019 | Fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** á TB oyðublaði (hvønn ársfjórðing) | § 5, stk. 9 í kunngerð nr. 1 frá 15. mars 2010 um gjaldføri (solvens) og rakstraætlanir hjá tryggingarfeløgum |
| 1. februar 2019 | Fráboðan um **skrásettar ognir og tryggingarligar avsetingar o.a.** á PP oyðublaði (hvønn ársfjórðing) | § 8 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum hjá tryggingarfeløgum |
| 2 dagar aftaná nevndar-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Ársfrásøgn, góðkend av nevndini**:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla<br>(**Útgreining av lyklatølum í 5 ára yvirlitinum** (pdf)) | § 122, stk. 1 í Tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná nevndar-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Grannskoðanarprotokoll** (pdf) | § 122, stk. 2 í Tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðalfundin, har ársfrásøgnin er góðkend, tó í seinasta 1. mai 2019 | **Ársfrásøgn**, **góðkend av aðalfundinum**, undirskrivað av fundarstjóra, nevnd, stjórn og grannskoðara:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla (um broyting) | § 123, stk. 1 og 4 í Tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðalfundin, har ársfrásøgnin er góðkend, tó í seinasta 1. mai 2019 | **Ársfrásøgn fyri dótturfeløg**, ið ikki eru tryggingarfeløg | § 123, stk.3 í Tryggingarlógini |
| 1. mai 2019 | TB- fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv**.<br>(**NB: sambært nýggju solvenskunngerðini fyri fyrstu ferð**) | § 5, stk. 4 í kunngerð nr. 1 frá 15. juni 2018 um solvens og rakstraætlanir hjá tryggingarfeløgum |
| 1. mai 2019 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 10 dagar aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar**: frágreiðing frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi,** latin nevndini í sambandi við, at nevndin góðkendi ársfrásøgnina. | § 7, stk. 7 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdar-havandi tryggingarfrøðing. |
| 1 mánað aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar:<br>**árliga frágreiðingin frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi** at lata Tryggingareftirlitinum. | § 8, stk. 2 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðing. |
| 30. juni | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar:<br>Lata **samanskrivað tøkniligt grundarlag** til Tryggingareftirlitið | § 2, stk. 8 í kunngerð nr. 5 frá 27. juni 2018 um fráboðan av tøkniliga grundarlagnum o.a. fyri lívstryggingarvirksemi |
| 1. august 2019 | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. august 2019 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 30. september 2019 | **Hálvársfrásøgn** fyri hálvárið 1. januar - 30. juni:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla | §§ 2 og 145 í kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum |
| 1. november 2019 | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. november 2019 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |

**Ársroknskapir og hálvársroknskapir sum excelfílur**
Oyðubløð til ársroknskapir kunnu takast niður sum excel fílur av heimasíðuni: www.tryggingareftirlitid.fo

**Dagførd TB og PP oyðubløð**

Mint verður á at senda inn av nýggjum dagførd TB- og PP oyðubløð fyri 4. ársfjórðing 2018, um fráboðaðu tølini 1. februar 2019 eru broytt í mun til ársfrásøgnina 2018. Dagførd oyðubløð skulu sendast eftirlitinum í seinasta lagi samstundis sum tann grannskoðaða og góðkenda ársfrásøgnin verður latin eftirlitinum. Broytingarnar skulu vera merktar við reyðum.